**Góðu studentar og góðu avvarandi**

## Heima – úti – heima.

Tað er tann eyðkendi bygnaðurin í einum góðum ævintýri, og tað er ikki uttan orsøk, tí soleiðis er lívið eisini fyri flestu okkara. Fyrst eru vit heima. Tað er tíðin, tá vit eru børn og vaksa til og ganga í skúla. Eisini miðnámsskúla. So kemur ein tíð úti. Vit fara at lesa víðari, læra ella ferðast. Og síðani finna vit heim aftur – kanska til eitt nýtt heim at byggja við øllum tí, sum vit hava við okkum úr barndómi, ungdómi, lestrar- og læruárum.

Tað er hásummar í Føroyum. Jóansøka er í morgin. Voxbotn byrjar í kvøld. Næturnar eru ljósar. Tit hava longu havt og fara at hava veitslur komandi dagarnar. Hetta eru nakrir magiskir dagar. Njótið teir.

Tit eru vaksin upp í einum av allar ríkastu londum í heiminum. Vit eru rík í Føroyum, vit eru trygg og vit eru í miðal væl útbúgvin. Tit eru helst partur av tí best útbúna og ríkasta ættarliðnum í søguni – nakrantíð og kanska eisini nakrastaðni!

*Góðu pisur*

Tit gerast vaksin. Tit fara at flyta út í einum tíðarskeiði, sum er spennandi – flestu okkara halda kanska í so spennandi.

Vit hoyra áhaldandi um serliga tvær kreppur. Eina veðurlagskreppu og eina kreppu orsakað av krígnum í Ukraina.

Kríggið hóttir okkara egnu handilsmøguleikar, millumlanda javnvágin verður skeiklað, so tann sterki dominerar tann lítla, og moralska kumpasskjakið vinnur sær veg inn í hvørja kaffistovu og til hvørt døgurðaborð.

Veðurlagskreppan bankar eisini av álvara upp á. Hitamet og met við turki – ella vatnflóð - eru gerandiskostur. Vit hoyra um skógareldar og bránandi ísfjøll.

Men tað er ein vón. Tað er altíð ein vón.

Tey ungu í øllum ættarliðum eru vónin. Altíð. Í tykkara ættarliði, í mínum ættarliðið og í framtíðar ættarliðum. Tað krevur dirvi og forvitni at vera ungur og taka ábyrgd. Men tað er har, vónir og árræði birtast.

*Góðu studentar*

Amerikanski journalisturin Sydney J. Harris skal hava sagt, at *sjálvt endamálið við útbúgving er at broyta spegilin til eitt vindeyga*.

Í speglinum sært tú teg sjálvan. Í vindeyganum sært tú út – sært onnur, sært heimin uttanum teg. Í ævintýrfrymlinum er heima spegilin. Tá tit bara sóu tykkum sjálvi og tykkara egna. Men ein spegil brynjar tykkum ikki til mótgongd og avbjóðingar. Tí ganga vit í skúla og umskapa spegilin til eitt vindeyga, so vit vita, hvat er har úti. So vit síggja tað fremmanda, skilja tað og fáa dirvi at lata vindeygað upp og stíga út í hendan nýggja heim. Heimin við veðurlagskreppum, kríggi, náttúruvanlukkum og flóttarfólkum, gamaní. Men eisini ein heim við stórum framstigi fyri mong fólk nógvastaðni í heiminum. Heimin, sum vit altíð eru ein partur av.

Ein vandi er tó. Hann er, at vit ongantíð sleppa speglinum, sum nú í stóran mun er fluttur av bróstinum í gongini inn í snildfonina. Snildfonina sum við sínum algoritmum skipar so fyri, at alt, ið vit síggja, er ein spegilsmynd av okkara egnu óreflekteraðu sannføringum – av einari kanska barnsligari heimsmynd. Vit vera stýrd av sníkum, teldufyritøkum, talgildum vitlíki og ringast av øllum: harðrendum diktatorum. Tað fólkaræðið, sum eisini skúlagongd var partur av, kann fara

fyri bakka, um vit ikki ansa eftir. Fólkaræðið og vitanarsamfelagið, sum vit øll hava so nógv at takka fyri, ridlar, um vit síggja okkum sjálvi og heimin alsamt meira gjøgnum ein tilgjørdan spegil alt lívið. Men útbúgving broytir spegilin til vindeyga. Hyggið tí út.

Mín vón er, at tit halda fram at vera forvitin og læra. Hvar tit enn fara, so lurta eftir tí, sum aðrar mentanir og samfeløg hava at siga tykkum. Ikki bara eftir tí, sum spegilin sigur gjøgnum tykkara news feed á Facebook, Instagram, TikTok o.s.fr.. Hyggið ikki bara í spegilin, men eisini út gjøgnum vindeygað! Uppliv náttúruna og livikorini aðrastaðni. Tosa við fólk, har tú kemur, og lurta eftir teimum. Ikki minst teimum, sum hugsa øðrvísi enn tú. Gerist greið yvir mótsetningarnar, tí í mótsetningunum liggja so mong svar, og mest av øllum, so skapa mótsetningar eisini virðing, um vit lurta. Virðing fyri øðrum og fyri tær sjálvum. Ein virðing sum fer at muna, tá tú kemur heimaftur. Tá tú hevur lisið, lært, ferðast og tikið heimin til tín. Tá tú fert at reiðrast og skapa nýggj ættarlið, sum eisini fara at liva og vera vónin í síni samtíð.

Danski teologurin og heimspekingurin K. E. Løgstrup sigur einastaðni, at "*Tann einstaki hevur ongantíð við eitt annað menniskja at gera uttan at hann heldur eitt sindur av hansara (ella hennara) lívi í síni egnu hond.*" Tit eru komin at kennast á skúlanum; tit hava samstarvað – kanska ilskast onkuntíð – men tit hava øll á ein hátt hildið lívið hjá hinum í tykkara hond og verið við til at forma lívið hjá hvørjum øðrum. Tit fara nú víðari í lívinum, ment, búnað og broytt hesi árini! Soleiðis eru tit øll vorðin ein partur av lívinum hjá hvørjum øðrum, og hava á ein hátt hvønn annan vit tykkum víðari í lívinum.

Føroyar er eisini partur av altjóða samfelagnum. Tí hava vit eisini við onnur lond og onnur fólk at gera. Hava ein part av teirra lívi í okkara hondum, og tey ein part av okkara lívi í sínum hondum.

„Er land mítt lítið, so er verðin stór," yrkir Karsten Hoydal í sanginum *Landið eg bar við mær inn um skúlagátt*, sum vit sungu í áðni. Landið er Føroyar. Ríkt, trygt og væl ment land. Hóast hetta landið er pinkalítið í stóru heildini. Men soleiðis er hjá øllum menniskjum. Verðin er og verður pinkalítil hjá tí einstaka. Tí hevur ein føroyingur minst líka stóra ábyrd í heiminum, sum ein dani, ein amerikanari ella ein indari.

Heima – úti – og so heima aftur

*Góðu pisur*

Hvar vit fara at síggja tykkum aftur í samfelagnum, vita vit ikki so nógv um beint nú. Men vit fara at síggja tykkum aftur.

Tað, sum hevur verið tykkara mál seinastu árini, verður nú umskapað til eitt amboð í tykkara framtíð. Brúkið nú amboðið við skili. Framtíðin kallar á tykkum. Framtíðin hevur brúk fyri tykkum. Tykkara áræði. Tykkara skapanarevnum. Tykkara kunnleika. Tykkum.

Studentarhúgvan er súmbolið uppá frælsið at gera títt næsta val.
Frælsi at fylgja tínum dreymum.
Frælsi at hugsa teg um.
Frælsi at vera tú.

At hvør einstakur fær møguleika at menna sína persónligheit, so man gerst førur fyri at skilja sína støðu í forhold til medmenniskju, náttúru og samfelag, er avgerandi. Ikki bara fyri einstaklingin, men eisini so man kann finna sín lut í felagsskapinum á ein meira tilvitaðan hátt.

At vit í størri mun gerast før fyri at skilja, hvørjum vit vilja liva fyri, heldur enn bara at renna eftir tí, sum vit vilja liva av.

Nú eru so hesi árini á Miðnámi á Kambsdali liðin, og ein nýggjur og øðrvísi gerandisdagur stendur fyri framman við nýggjum avbjóðingum. Tá tit byrjaðu, sóu hesi árini helst út til at vera nokkso drúgv, men tíðin gongur – og við spennandi avbjóðingum og í góðum selskapi, ikki bara gongur – men rennur tíðin avstað, og, nú sita tit her við blandaðum kenslum.

Tað er gott at vera liðug við útbúgvingina. Tað er gott at hava fullført eitt skúlaskeið, at hava fingið prógv í hondina og húgvu á høvdið. Men tað er eisini við sorgblídni, tit fara at skiljast, nú skúlagongdin er lokin. Men tað sorgblídnið er prógv um, at hesi árini á Kambsdali hava skapt vinarløg, ið verða varandi, hóast skúlagondin er liðug. Tit eru soleiðis øll vorðin ein partur av lívinum hjá hvørjum øðrum, og hava á ein hátt hvønn annan við tykkum víðari í lívinum. Tit hava í felag flutt tykkum frá speglinum móti vindeyganum. Røkið vinarlagið – og møtist onkuntíð at hugna tykkum saman. Tí einki er sum eitt gott vinalag. Í viðgongd og mótgongd. Heima – úti - heima. Hyggið onkuntíð í spegilin – men ikki bara!

Áðrenn eg endi, fari eg at takka lærarunum – og starvsfólkum skúlans sum heild - sum hava hjálpt tykkum hesi árini at flyta tykkum frá speglinum yvir móti vindeyganum. Njótið nú útsýnið!

Í endanum á einum av sínum mongu ævintýrum letur ævintýrmeistarin H. C. Andersens ein eldri høvuðspersón koma við hesi niðurstøðu: 'Lívið er tað besta av øllum ævintýrum.'

Við hesum orðum fari eg at ynskja tykkum HJARTALIGA TILLUKKU! Og Jesus fylgi tykkum fram á leið.

Óli Wolles, settur rektari
á Kambsdali 23. juni 2023